**Hoyr samrøðuna við Harley Bertholdsen á Rás2, fríggjadagin 30. januar kl. 16.10**



Harley sang við á fyrsta KÍ bandinum í 1992



Hesar gaggurnar eru nú lagdar á hillina



Harley - saman við tveimum KÍ formonnum Svend og Árna - við helli hjá Eliesar profeti í Ísrael

við 1991. Hóast Harley er góðsligari, enn tey flestu, so gjørdist tiltikna bikarið eisini ov fult hjá honum. Fáar dystir undan kappingarloki hevði KÍ útidyst ímóti B68 á Toftum. Her hendi tað ótrúliga. Harley varð vístur av vøllinum! – Ja tað er ein hending, sum eg ofta verið mintur á, og helst vil gloyma. Eg minnist at talan var um ein ógvuliga javnan dyst. Vit stríddust við teir, teir vóru likamliga sterkir, og væl fyri, so vit komu ikki til nakrar málmøguleikar, og kanska var tað orsøkin, sum gav mær órógv í sinnið. Eg leyp so framav, og hevndi meg inn á ein av teimum útlendsku spælarunum hjá B68. Harley er fattur tá hann greiðir frá hendingini. Hendingin var víst í ítróttarsendingini í sjónvarpinum, og fekk nógva umtalu í fjølmiðlunum og millum manna. Harley stóð til at fáa karantenu í 2 leikdagar, men tá saman um kom, fekk hann leikbann í ein dag. Boðini komu rættiliga knappliga frá Peturi Mohr, sum var venjari hjá KÍ tá, at hann kundi spæla, longu aftaná leikbann í ein dag.

## Spennandi í 90-unum

Hjá Harley var tað sera spennandi at verða partur av hópinum hjá KÍ í 1990-unum. Í 1992 fingu teir eina spennandi evropeiska avbjóðing, tá teir spældu Evropa Cup ímóti lettiska liðnum, Skonto Riga. Skonto vann 3-0 í Lettlandi, og 3-1 á Svangaskarði. Olgar Danielsen skoraði fyri KÍ. Í 1996 hevði KÍ eisini eitt gott lið, sum vann báðar dystirnar ímóti fremsta kappingarneytanum, GÍ. Men tá alt var liðugt, hevði GÍ ein málmun, sum var eitt mál betri, enn tann hjá KÍ. Í 1999 var Tony Paris venjari hjá KÍ, og hetta árið eydnaðist tað KÍ at vinna greipuna, og var eisini talan um eina fantastiska uppliving fyri Harley. Harley hevur eisini verið í Ungarn, í Ísrael og í Noregi við KÍ í samband við Evropa Cup. Aftaná aldarskiftið hevur tað ikki verið so spennandi, men Harley hevur so verið við til at halda KÍ í bestu deildini. Harley fekk 5 landsdystir á føroyska A-landsliðnum, men hann beit seg ongantíð fastan. Harley spældi sín fyrsta landsdyst á Ullevaal í Oslo, tá Føroyar tapti 2-0 í einum venjingardysti ímóti Noregi. Harley er ógvuliga sjálvkritiskur um orsøkina til, at tað ikki bleiv til meira enn 5 landsdystir: - Eg haldi, at eg havi verið ov veikur. Eg havi ikki verið ein nóg sterkur spælari. Og tað krevur meir á grasi. Men eg hevði eina fantastiska góða tíð við landsliðshópinum. Eg var við hópinum til EM-undankappingina 1994-1995. Har var gott samanhald, og ein upplivdi nógv. M.a. í Russlandi, sum var sera áhugavert. Ein kom víða við landsliðnum. Men næstu undankappingina fekk Harley ikki tíðina at ganga upp við sínum arbeiði, og valdi hann at gevast at satsa uppá landsliðið.

## Tiltikni dysturin ímóti MB

Spurdur um hvat hæddarpunktið hevur verið hesi 20 árini við besta liðnum hjá KÍ, er Harley ivaleysur: - Tað hevur verið at vinna Føroyameistaraheitið og steypakappingina. Men Harley vil kortini draga ein tiltiknan dyst ímóti MB, sum var spældur kappingarárið í 1990 fram. – Hetta var tá John Kramer var venjari. Vit møttu MB á heimavølli, og vóru aftanfyri 0-3 í hálvleikinum. 2. Hálvleikur var ikki meir enn byrjaður, so vóru vit aftanfyri 0-4. Men tá saman um kom vunnu vit 6-5, tað var ein fantastiskur dagur. Øll tustu inn á vøllin aftaná, tá dysturin var liðugur. Tiltikna útvarpingin hjá Magna Arge frá hesum dystinum, er onkuntíð løgd undir geislan, tá Harley og liðfelagarnar skulu minnast aftur á farin avrik. Enn hevur Harley ikki tikið støðu til, um hann fer at verða ungdómsvenjari, ella um hann fer at hava ein annan leiklut í KÍ. Harley er tó fullvísur í, at hann verður at finna millum áskoðarnarnar hjá KÍ á Injector Arena í framtíðini. Fáum er unt at spæla í bestu deildini í 20 ár. Tað er Harley væl unt, sum nú hevur takkað fyri seg. Miðlahúsið takkar Harley Bertholdsen fyri tíðina.

Sosialurin